

*HARMUR: Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, er keddur av, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin ikki funnu eina semju um fortíðina hjá løgmanni, tí Miðflokkurin hevur havt eitt gott samstarv við samgonguna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Harmiligt

**Miðflokkurin er harmur um, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin ikki kundu finna eina semju um, hvørjar avleiðingar fortíðin hjá løgmanni skuldi fáa. Hóast tað aldrin er heppið við nývali í úrtíð, so fer Miðflokkurin við góðum treysti at kappast føroysku veljararnar komandi vikurnar**

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað var ein harmur formaður í Miðflokkinum, vit hittu í løgtinginum, stutt eftir, at Anfinn Kallsberg hevði lagt kongin, og skrivað út nýval tann 20. januar.

Seinasta døgni hevur drúgt samskifti verið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, meðan Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin hava bíðað eftir eini endaligari avgerð.

– Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin hava klandrast leingi, og klandursflokkarnir kundu eftir øllum at døma ikki finna fram til eina loysn á hesum máli. Tað harmar meg, tí samstarvið hjá okkum við samgonguna hevur annars fungerað væl, sigur Jenis av Rana.

Hann leggur afturat, at tað er aldrin gott við einum løgtingsvali í úrtíð, men Miðflokkurin hevur kortini gott treyst til at fara undir valdystin komandi vikurnar.

– Eg vil siga, at vit í Miðflokkinum hava eitt avslappað forhold til eitt val, og vit fara at taka dystin upp, sigur formaðurin í Miðflokkinum.

## Angra ikki

Hóast løgmaður kom í rættiligan andróður eftir, at bókin, Skjót journalistin, kom á gøtuna, og fleiri setti spurning við, um tað var rætt av Anfinni Kallsberg at halda fram sum løgmaður, so var Miðflokkurin skjótur at gera garð um løgmann, og geva honum fullum stuðul at halda fram.

Miðflokkurin róð frammundir, at tíðin á Frostvirkinum hoyrdi fortíðini til, og tað var ikki rætt at blanda hansara leiklut sum løgmaður við fortíðina á Frostvirkinum.

*Angra tit hesa avgerð?*

Nei tað var ein røtt avgerð, tí vit vóru fullkomiliga samd í flokkinum um. Vit eru noydd til at fyrihalda okkum til tað arbeiðið, sum løgmaður hevur gjørt í hesi samgonguni, og tað hevur verið fyrimyndarligt. Vit hava ikki broytt meining á hesum økinum, tí tað er altíð lætt at grava í fortíðini hjá fólki og finna onkran feil, sum man einaferð hevur gjørt, sigur Jenis av Rana.

## Góð útlit

Miðflokkurin hevur hetta lítla árið í samgongu fingið størri og størri undirtøku millum føroysku veljararnar. Flokkurin hevur gjørt vart við seg á fleiri økjum. Fosturtøka, rúsdrekka, pornografi og samkynd eru øll mál, sum Miðflokkurin hevur havt eina greiða áskoðan um, og sambært veljarakanningunum gongur flokkurin fram, og helst fær flokkurin ein tingmann afturat.

– Eftir veljarakanningunum at døma, so gongur væl hjá okkum í løtuni, men veljararkanningar og løgtingsval kunnu ikki samanberast. Tað hevði kortini verið gott um vit kundu fingið ein ella tveir mans valdar afturat í løgtingi, so eg sleppi undan at sita einsamallur her, sigur Jenis av Rana flennandi.

# Misálitið var á veg



*MISÁLIT: Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin høvdu eitt misálit við sær í tingið í morgun. Tað kom kortini ongantíð so langt, tí Anfinn Kallsberg legði kongin, og nú eru báðir flokkarnir farnir undir at brynja til valstríð komandi vikurnar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Andstøðan var klár við einum misáliti á løgmann, um tað gjørdist neyðugt. Sum andstøðuflokkar fegnast bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin um nývalið. Jóannes Eidesgaard hevði kortini hugsað sær, at møguleikin við eini formansrundu varð royndur, tí so stutt er fráliðið av hesum valskeiði**

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Andstøðuflokkarnar, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkarnir høvdu eitt felags misálit á løgmann við sær í tingið í morgun. Báðir flokkarnar høvdu sett sær fyri, at varð úrslitið, at Tjóðveldisflokkurin fór at góðtaka umberingina frá Fólkaflokkinum, so skuldi eitt mísálit reisast ímóti løgmanni fyri at hava misbrúkt sítt løgmansembætið.

– Vit vóru klár við einum misáliti á løgmann í dag. Varð útfallið av hesum máli, at Tjóðveldisflokkurin av einari ella aðrari orsøk góðtók brævi frá Fólkaflokkinum, so høvdu vit reist eitt misálit, sigur formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard.

## Ongar samráðingar

Seinastu dagarnar hevur verið tutlað í krókunum um, at Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava tosað saman um eitt møguligt samgongusamstarv, so vit sluppu undan einum vali í úrtíð. Hesum vísa bæði formaðurin í Sambandsflokkinum og formaðurin í Javnaðarflokkinum kortini aftur.

Jóannes Eidesgaard sigur, at Javnaðarflokkurin hevur ikki verið í nøkrum veruligum samráðingum við nakran flokk, men nakað av korridor práti hevur kortini verið, sum hann málber seg. Lisbeth L. Petersen sigur somuleiðis, at Sambandsflokkurin hevur ikki tosað við nakran uttan við Javnaðarflokkinum um eitt misálit á løgmann.

## Frægasta loysnin

Avgerðin hjá Anfinni Kallsberg at leggja frá sær og skriva út nýval kemur væl við hjá andstøðuni.

– Eg haldi, avgerðin hjá løgmanni í dag var frægasta loysnin. Nú fáa vit eitt nýval, har vit lata veljararnar siga sín dóm, sigur formaðurin í Sambandsflokkinum.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur, at sum andstøðuflokkur er tað altíð gott við einum nývali. Hann kundi kortini hugsað sær, at møguleikin við eini nýggjari formansrundu varð royndur. – Eg haldi, at tað er í lagi við einum løgtingsvali nú, men nú er so stutt fráliðið í hesum valskeiðinum, at møguleikin fyri eini nýggjari formansrundu átti kanska at verið royndur meira, heldur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur afturat, at hetta er fyrstu ferð, at eitt løgtingsval er í úrtíð, har orsøkin er eitt reindyrkað persónsmál.

– Vanliga verða val útskrivað, tí flokkar kunnu ikki finna eina politiska semju um eitt nú eina fíggjarlóg, men hesaferð er talan um eitt reint persónsmál. Eg kann nevna Tamil málið í Danmark sum eitt líknandi dømi. Tá var heldur ikki farið meir enn eitt gott ár av valskeiðnum, og Poul Schluter valdi at leggja frá sær, men hann skrivaði kortini ikki út nýval, men opnaði møguleikan fyri eini nýggjari formansrundu. Hesin møguleiki varð kortini royndur hesaferð, sigur formaðurin í Javnaðarflokkinum.

## Hevnd

Jóannes Eidesgaard heldur, at hátturin, sum løgmaður segði upp samstarvið við Tjóðveldisflokkin upp á, er eitt brot á hansara vanliga hovliga máta at bera seg fram upp á. Tjóðveldisflokkurin tvíhelt um, at flokkurin hevði ikki álit á løgmanni, og tí sá løgmaður ongan annan møguleika, enn at siga teimum fýra landsstýrismonnunum hjá Tjóðveldisflokkinum úr starvi.

– Eg haldi orsøkin til, at løgmaður valdi at siga teir fýra landsstýrismenninar hjá Tjóðveldisflokkinum úr starvi er reindyrkað hevnd og fyri at vísa sína ónøgd við Tjóðveldisflokkin, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at eitt stórt brot er komið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, men hann vil kortini ikki avskrivað møguleikan, at hesir flokkar kunnu finna saman aftur eftir valið. – Eg haldi, at vit í dag kunnu staðfesta, at ætlanin hjá fullveldissamgonguni frá 1998 er parkerað í eina tíð, sigur hann

## Klár til val

Bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin siga seg verða klárar til valið 20. januar. Lisbeth L. Petersen sigur, at flokkurin er longu farin undir fyrireikingarnar, og flokkurin gleðir seg at fara undir valdystin.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur eisini, at flokkurin er klárur til valið, og Javnaðarflokkurin fer at arbeiða miðvíst fyri at koma aftur í samgongu, har flokkurin ikki hevur verið, síðan 1996. –Vit fara nú at brynja okkum til valstríðið, og høvuðsendamálið hjá Javnaðarflokkinum er at koma í landsins leiðslu aftur, sigur hann.



*TAKK FYRI HESAFERÐ: Javnaðarflokkurin er farin undir at brynja seg til valstríðið. Flokkurin dylir ikki fyri, at málið er at taka við landsins leiðslu aftur, eftir 7 ára oyðimarkargongd*
*Mynd: Jens Kristian Vang*